# Vassaðu í Vága-tunlinum

**Vágatunnilin varð stongur í hálvanannan tíma leygarkvøldið, tá eftirlititsfólk sóu vatn savnast á lægsta stað í tunlinum. Orsøkin vísti seg seinni at vera tekniskir trupulleikar við pumpuskipanini**

UNDIRSJÓVAR-TUNNIL
*Rúnar Reistrup*

Vanliga varnast tú ikki, at tú koyrir undir botninum av Vestmannasundi á veg til og frá Vágum. Men tá sjógvur leygarkvøldið sníkti seg upp á koyribreytina inni í tunlinum, og eftirlitsfólk máttu fara í gummistivlar, var skjótt at varnast, at Vágatunnilin setur onnur krøv til trygdina enn aðrir tunlar í landinum.

Vaktarfelagið, sum hevur eftirlit við tunlinum, boðaði umleið kl. 20.00 leygarkvøldið frá, at vatn fleyt út á koyribreytina við pumpustøðina niðast í tunlinum. Stutt eftir varð farið varð undir at kanna brekið, og meðan hetta varð gjørt, varð tunnilin stongdur fyri ferðslu.

### Uttan pumpur í tvey samdøgur

Pumpurnar vórðu startaðar uttan um sjálvvirkandi pumpuskipanina, og skjótt var allur sjógvurin pumpaður burtur úr tunlinum. Kl. 22.50 varð tunnilin latin upp fyri ferðslu aftur. Tá hevði koyrivegurin millum Vágoynna og Streymoynna verið stongdur í hálvanannan tíma.

Tað vístu seg at vera tekniskir trupulleikar við einum termo-relei, sum stýrir pumpunum, og tí høvdu pumpurnar ikki verið startaðar í eini tvey samdøgur, greiðir Dávid Reinert Hansen, stóri í p/f Vágatunnlinum frá.

Kannað verður nú nærri, hví sjálvvirkandi skipanin ikki riggaði, sum hon skuldi. Til svar er funnið á hesi gátu, verður vatnstøðan í pumpubrunninum kannað tvær ferðir dagliga.



*Sjógvur legðist á koyribreytina á niðasta parti av Vágatunlinum leygarkvøldið. Orsøkin var at pumpuskipanin, sum vanliga er sjálvvirkin, var óvirkin*



*Tað vóru tvey ymisk og óheft brek, sum gjørdu at automatiska útkallingarskipanin á Alarmcentralinum hvørki riggaði hóskvøld ella leygarmorgun fyri tveimum vikum síðan, tá eldur var í einum húsum heima á Sandi*

# Tvey ymisk brek á útkallingarskipanini

**Tá ein brandroynd heima á Sandi staðfesti eitt brek á útkallingarskipanini á Alarmcentralinum hóskvøldið fyri tveimum vikum síðan, varð tað beinanvegin rættað. Brekið, sum vísti seg tveir dagar seinni, tá eldur var í einum húsum heima á Sandi, var eitt annað brek, sum var óheft av fyrra brekinum, sigur Jón Klein Olsen, varaleiðari á Politistøðini í Havn**

TILBÚGVING
*Rúnar Reistrup*

Tá sløkkiliðið heima á Sandi skuldi skipa fyri brunaroynd hósvøldið fyri tveimum vikum síðan, vísti eitt brek seg á automatisku útkallingarskipanini hjá Alarmcentralinum í Havn.

Tá eldur tveir dagar seinni kom í eini hús heima á Sandi, var aftur brek á automatisku útkallingarskipanini, soleiðis at tey tvey vakthavandi á Alarmcentralinum sjálvi máttu ringja til hvønn einstakan sløkkiliðsmann heima á Sandi.

### Músin sveik

Men talan var ikki um sama brek tær báðar ferðirnar.

Politistøðin í Havn umsitur Alarmcentralin, og tað eru tey vakthavandi á støðini, sum skulu boða sløkkiliðnum á staðnum frá, um tey fáa boð um eldsbruna um 112 neyðarkallslinjuna.

Millum tólini á pultinum hjá teimum vakthavandi á støðini stendur ein telda, sum bert verður nýtt til at stýra automatisku útkallingarskipanini.

Sambært varapolitileiðaranum á politistøðini í Havn, Jón Klein Olsen, var brekið hóskvøldið at músin, ið hendan teldan verður stýrd við, fekst ikki at rigga. Hetta brekið varð rættað seinni um kvøldið.

### Teldan útskift

Brekið leygarkvøldið var við sjálvari telduni, sum stýrir automatisku útkallingini. Hon fekst snøgt sagt ikki at virka tá Alarmcentralurin fekk boð um eldsbrunan heima á Sandi. Teldan vísti seg seinni at vera heilt deyð og varð skift út við aðra teldu leygarmorgunin.

- So tað er ikki rætt at vit hava uppdagað eitt brek hóskvøld og forsømt at gjørt nakað við tað til leygarmorgun. Talan er um tvey hendilig tøknilig óhapp sigur Jón Klein Olsen.

### Roynd hvønn mikudag

Sambært varaleiðaranum á politistøðini í Havn verður automatiska útkallingarskipanin roynd hvønn mikumorgun. Tá verður ringt til nøkur av sløkkiliðunum kring landi, bæði til tess at royna teknisku útgerðina og til tess at venja sløkkiliðsmanningarnar kring landið at taka ímóti boðum.

Tann teldustýrda automatiska útkallingarskipanin varð tikin í nýtslu í 1996. Síðan tá er tað komið fyri nakrar ferðir, at skipanin ikki hevur riggað, tá á hevur staðið.

Til slíkar støður hevur Alarmcentralurin eina fasta mannagongd. Listar yvir allar sløkkiliðsmanningar verða goymdir í einum ringbindi, og riggar teldan ikki, verður hetta ringbind tikið fram. Síðan ringja tey vakthavandi sjálvi til sløkkiliðsmenninar.

### Brúk fyri skipanini

At ringt hvønn sløkkiliðsmann upp á vanligan hátt skuldi ikki tikið nógv longur tíð enn við automatisku útklallingarskipanini. Men tá ein alarmur hevur ljóðað, er ofta telefonstormur á telefonirnar á Alarmcentralinum tí so nógv fólk ringja ymisk fyri at boða frá sama tilburði.

Hesin trupulleiki er blivin størri seinnu árini, nú at kalla øll hava fartelefon og við henni fáa givið boð frá sær á staðnum.

Allar telefonuppringingar, sum koma til Alarmcentralin mugu svarast umgangandi, og tí er tað ikki altíð so lætt hjá teimum vakthavandi samastundis at ringja sløkkiliðsmenn upp.

Tí er brúk fyri einari automatiskari útkallingarskipan, ið sjálv ringir sløkkiliðsmenninar upp, tá brúk er fyri hjálp teirra.



# Málnýtslan kúgar kvinnur

**Kvinnur kenna seg illa til passar í føroyska málinum, sigur Kirsti Dee Hensen í sínari doktararitgerð, sum hon skal verja 3. mai. Kvinnur kenna seg ikki aftur í málinum, og tann veruleikin, sum málið skapar, svarar ikki til tann veruleikan, tær liva í**



*Kirsti Dee Hansen skal verja doktararitgerð um menn og kvinnur í føroyska málinum. Verjan fer fram á Gøteborg Universitet, 3. mai klokkan 10.*

MÁLSTREV
*Ingi Rasmussen*

Tvídrátturin millum kynini er størri í Føroyum enn í nógvum øðrum londum. Í øllum førum, tá tað ræður um mállæru.

Hetta er evni í doktararitgerð, sum málfrøðingurin Kirsti Dee Hansen (áður Kirsten Didriksen) skal verja á lærda háskúlanum í Gøteborg tann 3. mai 2003. Kirsti Dee Hansen er serfrøðingur í norður-lendskum máli. Føroyskt er eitt norðurlendskt mál, sum hevur varðveitt nógv av teimum upprunaligu sermerkjum, ið áður eyðkendu øll norðurlendsku málini, men sum partvíst eru burturblivin í teimum modernaðu skandinavisku málunum. Eitt nú eru føroysku navnorðini at finna í kall-, kvenn- og hvørkikyni.

Hetta er rótin til ein málsligan tvídrátt millum kynini. Ein tvídrátt millum mállæru og kyn. Eitt dømi er orðið lærari, sum verður brúkt um bæði kvinnur og menn. Tá víst verður til kvinnu, verður lærarin ummæltur sum »hon«, hóast talan er um kallkynsorð. Í føroyskum sæst eisini, at kallkyn verður nógv nýtt, tá tosað verður um bæði kyn. Serliga tá menn tosa.

Hendan tvídrátt hevur Kirsti Dee Hansen granskað, og burturúr er komin ein doktararitgerð, ið telur 412 síður.

### Kynsleyst kallkyn

Heitið á doktararitgerðini er »Brugen av maskulinum i færøsk«. Sum tittulin sigur, hevur Kirsti Dee Hansen kannað, hvussu kallkyn verður brúkt í føroyskum, og hvussu kallkyn verður fatað millum fólk; menn og kvinnur.

Málnevndin segði í 1998, at kallkynsformurin í mongum førum er kynsóbundin. Dømi um hetta kann verða landsstýrismaður. Var Annlis Bjarkhamar landsstýrismaður? Í føroyskum máli og lógarverki er hon landsstýrismaður og ikki -kvinna.

Kirsti Dee Hansen setir spurnartekn við, um tað er serliga kynsóbundið at brúka kallkyn um kvinnur í størvum, sum hava kallkynsheiti.

Fyri at kortleggja fatanina av kallkyni varð gjørd ein drúgv kanning, har 162 fólk vóru spurd um teirra hugsan. Úrslitið, sum hon kemur fram til, sáar iva um útsøgnina hjá Málnevndini.

### Munur á

Kanningin vísir týðiliga, at menn fata kallkyn sum knýtt at monnum. Tað vil siga, at tá menn úttala seg í kallkyni, so eru kvinnurnar stórt sæð ikki umboðaðar í teirra hugsan.

– Tað er helst mest yvirraskandi og skelkandi úrslitið av kanningini, sigur Kirsti Dee Hansen. Hinvegin uppliva umleið 30 % av kvinnunum, at tey eru umtalað. Sostatt kann ivi sáast um pástandin hjá Málnevndini.

Kirsti Dee Hansen sigur, at kallkynið kann setast inn í ein samfelagsligan samanhang. Tess meiri kynsóbundið eitt starvsheitið er, tess lægri status hevur starvið. Og øvugt. Tess meiri tað var knýtt at monnum, tess hægri status hevði tað. Sum dømi um hetta nevnir hon pedagog og prest. Tað fellur fólkum skeivt at siga »hann« um pedagogar, tí flestu pedagogar eru kvinnur, meðan tað ongin trupulleiki er við presti, tí flestu prestar eru menn.

### Niðurgjørdar

Kvinnur kenna seg illa til passar í føroyska málinum, er niðurstøðan hjá Kirsti Dee Hansen. Tær kenna seg ikki aftur í málinum, og tann veruleikin, sum málið skapar, svarar ikki til tann veruleikan, tær liva í.

Við øðrum orðum svarar veruleikin í málinum til ein gamlan veruleika, har menninir ráddu fyri borgum. Og tað vilja kvinnur ikki longur finna seg í.

– Kvinnan vil ikki longur konstruerast inn í eina tradition, ið niðurger hana, ger hana ósjónliga og setir hana sum nummar tvey eftir mannin, sum verður hálovaður og settur fram sum tað, ið er vert at stremba eftir, sigur Kirsti Dee Hansen.

# Bilastevna í Klaksvík

Tíðindaskriv

### Stór bilastevna verður í Klaksvíkar Ítróttarhøll 10 og 11. mai

Leygardagin 10. og sunnudagin 11. mai verður skipað fyri stórari bilstevnu í Klaksvíkar Ítróttarhøll. Ítróttarhøllin verður sum vant á tremur við nýggjum bilum. Tær luttakandi bilasølurnar verða: Norðbil, Berg Motors, Reyni Service, Ivan Johansen, Esmar Simonsen & Wenzel. Norðoyingar taka altíð væl ímóti slíkum stevnum, og hvørt ár eru tað hópin av fólki, sum leita sær í høllina at hyggja at tí nýggjasta nýggja innan bilheimin.

Tey vitjandi kunnu eisini atkvøða um vakrasta bilin, og harvið luttaka í einum lutakasti, tá ið stevnan endar. Vakrasti bilurin vinnur steyp til ognar.

Fyreikararnir siga í tíðindaskrivi, at stevnan verður opin báðar dagarnar frá kl. 15.00 til 21.00.

Báðar dagarnar verður skipað fyri undirhaldi fyri børn og ung.

Tað er fyritøkan IRIS, ið, saman við Klaksvíkar Ítróttarhøll, sum skipar fyri bilastevnuni.

Vegna fyrireikararnar
IRIS
Niclas Heri Jákupsson & Jógvan Eliasen
22 53 43 & 22 79 72